VINNUSÍÐURNAR
BLAÐIÐ við føroysku VINNU tíðindunum
Nr. 17 - 24. januar 2006

# Mugu finna olju fyri




Magni Arge, formaður í Oljuvinnufelagnum heldur spurningin um oljuleiting og orkuveiting sum heild vera partar av somu søk

Mynd Álvur Haraldsen




Bjarni Djurholm, landsstýrismaður setti ráðstevnuna

Mynd Álvur Haraldsen

**– Alt bendir á, at oljuprísurin verður høgur framhaldandi og helst fer at hækka enn meira uppá longri sikt, um eftirspurningurin verður varandi. Føroyska samfelagið er so heft at oljuni, at vit tí hava tørv á antin at útbyggja viðvarandi orku munandi ella at finna oljuna sjálvir, so vit fáa eina javnvág í okkara oljunýtslu og framleiðslu sigur Magni Arge, formaður í Oljuvinnufelagnum**

OLJURÁÐSTEVNA

*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

– Hetta var ein frálíkt ráðstevna. Um morgunin hevði eg kensluna av, at hetta kanska var ein hin mest áhugaverda, sum vit hava havt yvirhøvur. So avgjørdur er Magni Arge, formaður í Oljuvinnufelagnum, sum setti "Offshore Faroes 2006" í Norðurlandahúsinum nú um dagarnar. Magni Arge, sum hevur fylgt oljutilgongdini sera neyvt øll hesi seinastu árini bæði frá Vinnuhúsinum og frá palli sínum í Atlantsflogi veit betur enn nakar, hvussu álvarslig og tyngjandi framtíðin kann gerast fyri føroyska samfelagið halda oljuprísir fram við at hækka og vit ikki gera okkum minni heft at oljuni. Á oljuráðstevnuni kom fram, at Føroyar eru eitt tað land í øllum heiminum, sum er mest heft at eini orkukeldu, nevniliga oljuni. Ikki minni enn 94% av orkuforbúkinum stava frá olju. Ímynda vit okkum, at prísirnir halda sær og bara vaksa eisini, so verður galin endi.

Og tað var nettupp tí, at formaðurin í Oljuvinnufelagnum, sum skipaði fyri ráðstevnuni var so fegin um, at tey ikki bara umrøddu leiting eftir olju men eisini prís, nýtslu og tørv á olju sum orkuveitari og á viðvarandi orkukeldum so sum vindorku og alduorku.

Magni Arge, sum hevur verið orðstýrari á teimum flestu av oljuráðstevnunum, sum hava verið í Føroyum seinastu árini er tískilt nøgdir við stevnuna, hóast onkur helt fyri, at leiting og orkuveiting og orkubrúk ikki áttu at verið blandað saman.

## Spennandi framløgur

– Tað var ein sera spennandi framløga bæði Heri Ziska og Gareth Allinson høvdu um leitingina á føroyskum øki og tætt við Føroyar. Tað var so eisini hugaligt, at bjartskygni eyðkendi framløgurnar. Eg haldi eisini, at framløgurnar hjá Magna Laksafoss og Richard Hardmann vóru sera tankavekjandi. Tær vóru ein sera góð introduktión at fara inn og hyggja eftir orkupolitiskum spurningum sum heild - at vit helst hava nátt "the peak" í oljuhøpi tvs. at vit kunnu ikki rokna við at finna líka nógva olju í framtíðini, sum vit koma at brúka. Harvið er ikki sagt, at vit koma í nakra stóra neyð her. Men tað sigur okkum í hvussu so er, at tað í Føroyum eins og man hevur gjørt sær greitt so nógva



Frá oljuráðstevnuni í Norðurlandahúsinum, har bæði olja og viðvarandi orkukeldur vóru á skránni.